# so vælsignað













rættiliga virkið. Umframt tann nú árliga »Dans på bryggan«, skipar felagið fyri siglingartúrum kring oyggjarnar. Hetta hendir umvegis eina sms-skipan, har limirnir fáa boð, ella ber til at hyggja inn á heimasíðuna hjá felagnum, sum kallas www.marina.fo

Túrar verða fyriskipaðir til Suðuroynna, Sandoynna, Vágoynna, Norðoyggjar, ja, um alt landið.

Men felagið hevur eisini eina aðra uppgávu, og tað er at taka ímóti fremmandu bátunum, sum vitja okkum á hvørjum sumri.

- Higartil í ár hava vit havt 51 bátar á vitjan. Í fjør var talið 85, og annars hevur tað ligið rættiliga javnt um teir eitthundrað um árið. Veðrið longur niðri í Europa hevur ikki verið so gott, og tað hevur helst ávirkað ferðahugin við báti tvørtur um hav, heldur Kartni Olsen.

Hann heldur, at viðurskiftini er nógv broytt til tað betra, síðani bátafelagið sá dagsins ljós fyri skjótt tíggju árum síðani.

- Tá fólk koma soleiðis, vilja tey sleppa at brúsa sær, vaska klæðir og nýta WC. Hesi viðurskiftini eru munandi batnað seinastu árini, sigur formaðurin í Tórshavnar Bátafelag.

Næsta uppgávan hjá felagnum stendur longu fyri durum, og tað er at taka ímóti mongu bátunum, sum koma til Havnar á Ólavsøku. Tað er fyri tað mesta at leggja bátarnar og leggja streym út til teirra.

- Viðurskiftini í Vágsbotni er góð nú. Sjálvandi kundi okkurt altíð verið betri, men eg haldi, at vit eru komnir langan veg frá tí felagið varð stovnað. Eitt nú er kloakkskipanin gjørd heilt av nýggjum. Eisini hava vit fingið eitt ógvuliga gott samstarv við bæði býráðið, havnanevndina og Tórshavnar Havn, sigur Kartni Olsen, formaður í Tórshavnar Bátafelag.